Fríggjadag
við SV- og ÚF-skránni
"ÚR LUFTINI"

Dimmalætting

NR. 124 • Týsdagur 11. oktober 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212

7 kr.

# Olja spríkir við føroyamarkið

**Fyri aðru ferð í eina viku er komið fram á ómetaligar oljunøgdir í undirgrundini millum Hetlands og Føroya.**

**Aberdeen, Diml.**

Nýggjar og bjartar vónir fyri framtíðar frálandavinnu kyknaðu um vikuskiftið, tá ið »British Petroleum« (BP) kom fram á eina ta størstu olju- og gasskelduna higar til bert tríggjar fjórðingar uttan fyri føroyska fiskimarkið.

Serfrøðingar meta fyribils, at góðar vónir eru fyri, at frálandavinnan í bretska økinum fer at mennast heldur enn at minka komandi árini, sum væntað hevur verið.

At teir nú hava funnið nýggjar stórkeldur vestan fyri Hetland bendir á, at oljuídnaðurin fer at fáa størri týdning langt inn í 21. øld, enn nakar hevði roknað við.

### Ómetaligar oljunøgdir

Aberdeenblaðið »Press and Journal« avdúkaði í gjár, at BP helst eisini situr á seks øðrum økjum, sum skjótt kunnu gerast millum heimsins størstu frálandadeplar í hesum parti av Atlantshavi.

Somuleiðis er annað týðandi oljufelag, »Arco«, sum verður hildið at hava rakt við svart gull í sma øki; men alment er onki frætt um hetta enn.

Seinasta týsdag váttaði stórfyritøkan »Amerada Hess« kortini, at teir høvdu góðar vónir og væntaðu sær nógv av parti sínum í Schiehallion økinum á somu leið.

Fólk innan oljuvinnuna ivast ikki í, at nýfunnu keldurnar væl og virðiliga standa mát við risafundir í Norðsjónum sum til dømis Forties.

Eingi tøl í sambandi við tær nýggju keldurnar, BP hevur rakt við, eru kunngjørd enn, men serfrøðingar meta olju- og gassnøgdirnar vera ómetaligar.

### Kunnu bora innum

Royndarboringar fara fram á 800 metra dýpi, 110 fjórðingar úr Hetlandi og minni enn 100 fjórðingar úr Føroyum.

Og hesar nýggju boringarnar hjá BP fara fram einans tríggjar fjórðingar uttan fyri føroyska fiskimarkið!

Nútíðar tøknifrøði ger tað møguligt at bora ígjøgnum inn um føroyska markið, so nágreiniligar upplýsingar fingust til vega um støðd keldunar.

Slíkt hevði elvt til ógvusliga øsing í tvídrátti Bretlands og Danmarkar millum um, hvar markið í sambandi við oljuríkidømið skal setast.

Hetta orðaskiftið kom helst undan kavi í gjár, tá ráðstevna var um frálandavinnuna vestan fyri Hetland.

Robert Gordon University hevur skipar fyri ráðstevnuni saman við Smith Rea Energy Associates.

Fleiri føroyingar vóru á hesum fundinum í gjár, m.a. Árni Olafsson úr danska uttanríkisráðnum.




Bretska oljufelagið British Petroleum hevur, har ørvurin vísir, rakt við olju. Hetta er bert tríggjar fjórðingar – tað er umleið fimm kilometrar – frá føroyska fiskimarkinum

## Í BLAÐNUM Í DAG



### Fiskavirking markleysa frek

– Ístaðin fyri at gerast tað lokomotivið, sum dró okkara fiskavørur á marknaðin, verður bert roynt at herða monopolið og lata skip og manningar gjalda gildið við at landa í Føroyum fyri dumpingprís, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

### Fiskavirking órættvísa viðferð

Kaj Leo Johannesen sølumaður heldur Fiskavirking fáa órættvísa viðferð og minnir á saltfiskavirkið á Toftum, sum er ein frøi fyri eygað, virkið í Vestmanna, Tvøroyri, Fuglafirði og Runavík, sum fáa útlendskar framleiðarar at øvunda okkum.

### Stórur áhugi fyri føroyskum troyggjum

Vaksandi áhugi er fyri troyggjum, ið eru virkaðar burtur úr føroyskari ull. Meðan útlendingar fegnir vilja keypa troyggjurnar, hava føroyingar heldur hug at binda tær sjálvir.

### Nýggj kommunulóg

Eilif Samuelsen landsstýrismaður við kommunumálum er farin til verka at útvega kommunum ítøkiligt tilfar at taka støðu til í sambandi við ein øðrvísi kommunustruktur í framtíðini. Hetta tilfar hava kommunurnar higartil saknað.

### Austin-konsert

Kendi urguleikarin Michael Austin byrjar í dag kirkjukonsertferð sína í Føroyum. Fyrsta konsertin hjá honum verður í Fuglafjarðar kirkju í kvøld. Skráin verður nakað annaðleiðis enn til hinar kirkjukonsertirnar, sum verða.



### Nýtt Flógvakríggj

Í løtuni bíðar heimurin í spenningi eftir, hvussu leikur fer fram á markinum millum tey bæði muhammedansku londini, tað stóra, fátæka Irak og tað lítla, ríka Kuwait. Saddam Hussein hevur flutt 64.000 hermenn til landamarkið.

# Vetrar-avtala millum Atlantic og Maersk

**Í vetur fer Atlantic Airways ikki at flúgva týsdagar og Maersk Air ikki at flúgva mikudagar.**

BEATE L. JENSEN

Ein samstarvsavtala er fingið í lag millum Atlantic Airways og Maersk Air.

– Og hon er longu undirskrivað, sigur stjórin í Atlantic Airways, Heri Mortensen við *Dimmalætting.*

Avtalan, sum kemur í gildi 1. november í ár, gongur út uppá, at Atlantic Airways ikki flýgur týsdag og Maersk Air ikki flýgur mikudag.

Á henda hátt verður tann eina flogrutan teir báðar dagarnar í vikuni.

Fyrri partur av avtaluni gongur út 13. desember.

Um jólini og á nýggjárinum flúgva bæði flogfeløgini allar dagar í viku, men 10. januar 1995 tekur annar partur av avtalan við aftur, soleiðis at danska flogfelagið aftur tekur sær av Føroyarutuni týsdagar og føroyska flogfelagið mikudagar.

### Skilagóð avtala

Henda avtala gongur til 25. mars.

Vetrar-avtalan er gjørd millum partarnar av tí, tað er ógvuliga avmarkað, hvussu nógv ferðafólk flúgva hesa ársins tíð.

Fyri ikki at drepa hvønn annan heilt og flúgva meiri og minni við hálvtómum flogførum vetrarhálvuna, hava umboð fyri Atlantic Airways og Maersk Air hildið tað verið best fyri báðar partar at skriva undir eina slíka samstarvsavtalu.

Heri Mortensen, stjóri, sigur hetta vera eina góða avtalu, sum hann er glaður fyri.



**DÁNJAL PAULI DANIELSEN HEIÐRAÐUR.** Fríggjadagin fekk D. P. Danielsen handað Jacob Letterstedt-heiðursteknið. Marita Petersen, løgtingsformaður, handaði honum heiðursteknið á samkomu í tinghúsinum í Havn. D. P. Danielsen er fyrsti føroyingur, ið hevur fingið heiðurstekin frá tí svenska Letterstedtska Felagnum. Hann fekk m.a. teknið, tí hann sum landsstýrismaður í mentanarmálum 1975-1981 arbeiddi fyri at fáa Norðurlandahúsið í Føroyum á føtur

# Løgmaður fegin um oljufinning

**Edmund Joensen fegnast um, at BP hevur funnið olju skamt frá føroyskum øki, tí hetta gevur ábending um, at ríkidømi eisini er í undirgrund Føroya.**

PER HØJGAARD

Edmund Joensen, løgmaður, er fegin um tíðindini, ið fræltust tíðliga gjáramorgunin um, at British Petroleum hevur funnið olju bert tríggjar fjórðingar frá føroyska fiskimarkinum.

– Í landsstýrinum fegnast vit, tí hetta gevur okkum uppaftur størri ábendingar um, at ríkidømi møguliga finst okkara megin markið, sigur Edmund Joensen.




### Truplar samráðingar

Bretskir og føroyskir myndugleikar hava í langa tíð samráðst um, hvussu markið millum londini bæði skal setast.

Nú olja er funnin bert fimm kilometrar uttan fyri føroyska fiskimarkið, roknar løgmaður við, at marknaðsamráðingarnar kunnu gerast truplar.

– Í øllum førum er greitt, at samráðingarnar við bretar fara ikki at verða lættari, nú líkt er til, at stórar nøgdir av olju finnast í okkara øki, sigur Edmund Joensen.

Hann leggur dent á, at føroyingar eiga framvegis ikki at leypa framav í spurninginum um eina møguliga føroyska frálandavinnu.

Í sjónvarpssending sunnukvøldið segði Edmund Joensen millum annað, at tað hevur týdning, at alt lógarsmíð oljuvinnu viðvíkjandi er væl úr hondum greitt, áðrenn farið verður at bora eftir olju.

# Stjóraviðurskiftini í SVF og ÚF framvegis ógreið

**1. januar fer Árni Gregersen, sjónvarpsstjóri, í nýtt starv. Hann tekur við programleiðarastarvi á deildini hjá TV2 á Bornholm. Og 30. apríl næsta ár gongur starvstíðin hjá útvarpsstjóranum, Jógvan Jespersen, út. Enn hevur landsstýrið ikki gjørt av, hvussu vorðið verður við teimum báðum størvunum.**

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Nú Árni Gregersen hevur gjørt av at fara í annað starv, eru gitingar beinanvegin farnar at ganga um, hvussu vorðið verður við teimum báðum stovnunum, Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya.

Onkur heldur, at útvarpsstjórin, hvørs starvstíð gongur út longu 30. apríl komandi ár, fer at nýta høvið at søkja stjónvarpsstjórastarvið. Landsstýrið hevur nevniliga framvegis ikki tikið støðu til, hvussu vorðið verður við hansara starvssetan aftaná 30. apríl.

– Eg kann bara siga, at eg fyri umleið einum ári síðani bað um at fáa at vita, hvussu míni viðurskifti verða aftaná 30. apríl næsta ár, men eg havi framvegis ikki fingið svar frá landsstýrinum, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

Hann vil ikki gera nakra viðmerking til, hvørt hann fer at søkja starvið sum stjóri í SVF, ella um hann metir at stovnarnir skuldi verðið lagdir saman.

Annars hava bæði Árni Gregersen og Jógvan Jespersen áður mælt frá eini samanlegging.

### Landsstýrismaðurin kannar viðurskiftini

Landsstýrismaðurin í m.ø. útvarps- og sjónvarpsmálum, Sámal Petur í Grund, hevur ikki gjørt sær stórvegis metingar um, hvørt bygnaðurin í Sjónvarpi Føroya og Útvarpi Føroya skal broytast. Spurdur um hann fer at gera sítt til, at teir báðir loftmiðlarnir verða lagdir saman, sigur Sámal Petur í Grund, at hann fer at kanna hesi viðurskifti.

– Eg havi onga greiða meting um hetta. Veit bara at onkrar kanningar eru gjørdar, sum benda á, at tað ikki er nakar fíggjarligur fyrimunur at leggja stovnarnar saman.

– Men nú fari eg at kanna hesi viðurskifti betur, sigur Sámal Petur í Grund.

### Ónøgdin ikki orsøk til starvsskiftið

Árni Gregersen hevur ikki dult fyri, at eisini hann var ónøgdur við ótryggu setanarviðurskiftini hjá sær í Sjónvarpi Føroya. Hann hevur fleiri ferðir gjørt greitt, at fekst greiða ikki á setanarviðurskiftunum, ætlaði hann aftur í starvið sum programleiðari.

Men í Útvarpinum og Sjónvarpinum fríggjakvøldið vísti Árni Gregersen aftur, at ónøgdin við ógreiðu viðurskiftini í sambandi við stjórastarvið er orsøkin til, at hann fer í annað starv.

– Innan fjølmiðlayrkið er vanligt at skifta arbeiði av og á. Nú havi eg so annað gott starv í boði, og ongin sigur, at eg fái slíkt tilboð um fýra ár, tá starvstíðin sum stjóri í Sjónvarpi Føroya er úti, segði Árni Gregersen millum annað.

Árni Gregersen hevur starvast í Sjónvarpi Føroya seinastu tíggju árini. Frammanundan hevur hann verið í starvi á danska blaðnum BT, Fjúrtanda september og í Útvarpi Føroya.

Prentlutir

Skjót avgreiðsla
Kappingarførur prísur



Ring tlf. 11212

Dimmalætting